LM-099/2023

Fylgiskjal 89

Viðmerkingar frá Visit Tórshavn, Visit Vágar, Visit Suðuroy (Vágur) og Fuglafjarðar kunningarstova til lógaruppskotið um burðardygga ferðavinnu

Visit Tórshavn er kunningar- og menningarstova umboðandi alla Tórshavnar kommunu. Á leið 90% av øllum ferðafólkum gista í kommununi, og vit vegleiða meginpartin av øllum ferðafólkum, onkur enntá dagliga.

Visit Vágar er menningarstova umboðandi Vága- og Sørvágs Kommunur, sum arbeiðir við ferðavinnu menning í økinum. Á leið 90% av øllum ferðafólkum sum vitja Føroyar hava vitja náttúru økir í sýsluni.

Visit Suðuroy, Vágur, er ein kunningar- og menningarstova umboðandi Vágs Kommunu og Suðuroynna. Vit arbeiða við menning av lokaløkinum og í gjøgnum sparring við aðrar kommunur í oynni. Harumframt ráðgeva og vegleiða vit ferðavinnuveitarar og ferðafólk, ið koma til oynna.

Fuglafjarðar kunningarstova arbeiðir við menning og kunning av ferðavinnumøguleikum í Fuglafirði og í Eysturoynni.

Vit eru fegin um, at eitt lógaruppskot at skipa rammurnar í føroysku ferðavinnuni endiliga er ávegis, og har er nógv jaligt í uppskotinum. Tó vilja vit fegin koma við viðmerkingum til núverandi uppskot, sum vónandi verða tiknar til eftirtektar.

Vit stilla okkum fegin tøk til eitt uppfylgjandi prát.

Til §2 Allýsingar

Tað átti at verði allýst hvat eitt ferðafólk er.

Til §3

Í Mykinesar bygd er Heimrustin galdandi í bygdini tvs. At bygdin er ogn hjá eigarum og brúkarum. Er tað nakað í hesi lóg, sum gevur øllum rætt til at ganga í eini bygd, við teimum ásetingum og skyldum, sum eru ásetta í lógini?

Til §6 Ferðavinnuætlan

Tíðarfreist á at gera ferðavinnuætlanir

Tað verða m.a. kunningar- og menningarstovur, sum fáa til uppgávu at gera hesar ferðavinnuætlanir, sum verða nevndar í uppskotinum. Ferðavinnuætlanirnar fara at leggja ógvuliga stóra umsitingarliga ábyrgd og trýst á kommunur, kunningar- og menningarstovur. Tað kann eisini hugsast at verða tíðarkrevjandi at fáa semjur í lag, um hvat ferðavinnuætlanirnar skulu fevna um.

Kommunurnar eru ymiskar á stødd, summar hava fleiri bygdir undir sær enn aðrar, tí verður tað ógvuliga ymiskt, hvussu langa tíð tað kann taka, at gera eina ferðavinnuætlan. Tað kann

taka fleiri ár hjá eini kommunu við fleiri bygdum, meðan ein kommuna, við einari bygd, kann gera tað uppá nakrar mánaðir. Hinvegin hevur ein lítil kommuna ikki tilfeingi (ressursir) til at gera ferðavinnuætlanir, so sjálvt hjá smáu kommununum kann tað verða ein avbjóðing. Uppskotið í núverandi formi við arbeiðsbýti leggur upp til, at burðardygdin bert verður so góð sum ressursirnar á staðnum eru (verið tað økonomiskar ella menniskjaligar). Hetta merkir, hvussu burðardygt ferðavinnan verður skipað, verður øgiliga ymiskt frá staði til stað, og er hetta ikki serliga burðardygt.

Tí er tað umráðandi, at økini fáa hóskandi tíð og ressursir til at gera ferðavinnuætlanirnar.

Útreiðslur av at gera og halda ferðavinnuætlan, umsita skilhaldsreglur og inntøkur
Fyrireikingararbeiðið, at gera ferðavinnuætlanir, hevur nógvar útreiðslur við sær. Útreiðslur til at seta verkætlanarfólk at hava ábyrgd, at samskipa arbeiðið at skriva ferðavinnuætlanir, og eisini útreiðslur til t.d. at gera kanningararbeiði, seta torleikastig, verndar- og trygdarmetingar, fuglakanningar o.s.fr. Tað er umráðandi, at kommunur/økir fáa eina hóskandi upphædd til at gera ferðavinnuætlanirnar. Hvørt øki má í minsta lagi seta eitt fulltíðarstarvsfólk við hóskandi førleikum at arbeiða við ferðavinnuætlanum, og eftirfylgjandi mugu starvsfólk setast, at umsita skilhaldsreglur, ferðavinnuætlanina, inntøkurnar frá náttúrugjaldinum o.s.fr. Her má fígging setast av til økini til umsiting, eins og 1,5 mió. eru settar av til Uttanríkis- og vinnumálaráðið at gera støðumetingar og býta peningin!

Eisini má fígging setast av til hóskandi skelting á gonguleiðum, eins og hesar nýggju gonguleiðirnar skulu framleiðast á kort til ferðafólk, ið eisini hevur ein stóran fíggjarligan post.

Ein meting er, at útreiðslur til umsiting verður í minsta lagið 1 millión, fyri hvørt øki, sum fer til at fíggja starvsfólk at samskipa ferðavinnuætlanir, umsita skilhaldsreglur og inntøkur umframt at fíggja kanningararbeiði í t.d. jarðfrøði, fuglafrøði o.s.fr.

Avmarkingar
Summi øki eru meira viðbrekin enn onnur, umframt at undirstøðukervið ikki er hóskandi til stóra ferðslu. Taka vit t.d. Mykines, so kunnu bátar óavmarkað seta fólk á land, og t.d. bygdir sum Skarvanes er vegurin einsporaður, og einki parkeringspláss er í bygdini, og líknandi støður eru viðvíkjandi veginum og ferðsluni til Tjørnuvíkar og Kirkjubø, fyri at nevna nøkur dømi.

Ein avbjóðing er tá gøtur verða gjørdar úti í náttúruni, kemur tað ofta fyri at hesar verða oyðilagdar av t.d. rossum, fýrahjólarum o.s.fr. Tí hevði verið skilagott um man við ferðavinnuætlanunum kundi sett avmarkingar á akfør, bæði úti í náttúruni, sjóvegis, og á vegum og lendingum.

Vit mæla til, at tað verður orðað í lógaruppskotinum, at kommunur hava heimild til at seta avmarkingar fyri akfør og ross á náttúrugøtum, um tær ikki megna trýsti frá munandi øktari ferðslu.

Ferðavinnuætlanirnar og broytingar

Í §17 stendur at løgtingslógin fær gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, hetta kann hava negativar avleiðingar við sær, tí freistin fyri at ferðavinnuætlanirnar skulu verða lidnar fyrst er tann 1. juni 2025, hvat er so galdandi til tá? *Tað hevði verið skilagott, um lógin fekk gildi, samstundis sum ferðavinnuætlanirnar skulu verða lidnar.*

Harafturat stendur einki í lógini um møguleikan fyri at gera broytingar í ferðavinnuætlanunum eftir tørvi, ella nøkur krøv til at tær skulu endurskoðast e.l. Tað er týdningarmikið, at ætlanir verða endurskoðaðar regluliga.

Við tíðini koma nógvar broytingar, bæði í náttúruni og undirstøðukervinum, og tí er ikki sannlíkt, at ávísar avmarkingar og loyvir, eru aktuell um nøkur ár. T.d. kann ein farleið slítast somikið nógv, at hon gerst vandamikil at ferðast á, og tørvur verður á at seta avmarkingar á ferðsluna.

Tí er skilagott um man fekk tað orðað í lógaruppskotinum, at broytingar og tillagingar kunnu gerast í ferðavinnuætlanunum, umframt at ferðavinnuætlanir endurskoðast eftir tørvi, tó í minsta lagi t.d. 5. hvørt ár, fyri at tryggja at tær eru viðkomandi.

Samstarvið við serstøku nevndina

Í §6 stendur, at 'Ferðavinnuætlanin skal gerast saman við serstøku ella staðbundnu nevndini.' Hetta kann hava fleiri avbjóðingar við sær. Hvussu skal hetta skiljast? Eru nøkur krøv til at kommunan skal fylgja ráðunum sum nevndin kemur við? Eru nøkur krøv til nevndin skal góðkenna ferðavinnuætlanina? Tað er veikt orðað hvørja funktión serstaka nevndin hevur. Sum vit skilja tað, er nevndin bert ráðgevandi.

Tað eru sterkar og ymiskar meiningar um lógaruppskotið, og tað kann koma fyri at allir partar ikki eru semjusøkjandi í málinum um ferðavinnuætlanir.

Til §7 Staðbundnu nevndirnar

Tað er skilagott at taka atlit til heimafólkið, tá ferðavinnan í kommununi verður ment og útint. Tó meta vit, at tað skuldi verið sett nøkur krøv til hvussu staðbundnu nevndirnar verða valdar og samansettar, tí tað kann koma fyri, at nevndin ikki er breitt umboðandi.

Tað verður skrivað, at nevndin í mesta lagi má standast av sjey limum. Tað átti samstundis at verið eitt minstamark fyri nevndina. Samstundis átti nevndin, um fólk eru til tess, at vera samansett m.a. av limum, ið annaðhvørt umboða hagar, bygdafólki og ferðavinnuna.

Til §8 Farleiðir

Tá nýggjar gøtur skulu gerast uttangarðs, berir hetta við sær, at fleiri partar og myndugleikar skulu uppí arbeiðið. Tað kann hugsast at taka langa tíð, at fáa loyvi at fara í gongd við arbeiðið

at gera gøtur, umframt at hesir partar fáa eina munandi økta arbeiðsbyrðu. Hetta eigur tí at verða tikið til eftirtektar, tá man ásetur nær lógin skal koma í gildi.

Í samband við stk. 3: *Kommunurnar hava ábyrgd av at halda tær gomlu bygdagøturnar.*

Tað átti at verið greitt skrivað, hvør hevur ábyrgd av at halda tær nýggju gonguleiðirnar.

Til §13 Náttúrugjald

Náttúrurgjaldið er sett lágt, um tað skal fíggja allar tær umsitingarligu uppgávurnar sum fylgja við, umframt kostnaðin av at viðlíkahalda- og at gera nýggjar gøtur. Serliga fyrstu árini verða stórar fíggjarligar avleiðingar fyri kommunur og kunningarstovur.

Fígging av øktu umsitingarligu uppgávunum átti heldur at komið frá landinum. Alternativt átti gjaldið at verið hægri enn tað, gjaldið er sett til í lógaruppskotinum - møguliga kundi gjaldið verið hægri fyrstu árini, og síðan lækkað stigvíst.

Vit vilja gera vart við, at í lógaruppskotinum pkt. 2.11. verður skrivað at Náttúrugjaldið er 120 krónur í meðan tað í pkt. 2.1. verður útroknað við, at Náttúrugjaldið er áljóðandi 150 krónur.

Eisini stendur skriva í lógaruppskotinum $6 stk. 3 at ferðavinnuætlanin vera liðug 1. juni 2025, í meðan tað í kapittul 3 undir serligar viðmerkingar til $6 stk. 3 stendur at hon skal vera liðug 1. januar 2025.

Bryndis í Dali

Bryndis í Dali

Menningarleiðari, Visit Vágar

Tordis K. A. Rógvi Biskupstø

Stjóri, Visit Tórshavn

Magnus Pauli West

Leiðari, Visit Suðuroy

Kristina Gry Berg

Kristina Gry Berg

Leiðari, Kunningarstovan í Fuglafjørði